# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**MERCEDES-BENZ 190**
Árg 1961, Ellisakfar til sølu. Bilurin er í sera góðum standi. Kr. 50.000.
**Tel. 211208**



**BMW R 100 SR 1.000 CC**
Árg 1981, Km 51.000. BMW R 100 SR til sølu. Motorsúkklan er í sera góðum standi. Kr. 55.000.
**Tel. 211208**

**KIA PRIDE 13 5 HURÐAR**
Árg Oct-98, Km 118.000. El-rútar Radio v.m. Kr. 38.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 72.600. El-rútar. fr., Radio, v.bandspælara v.m. Tilboð uttan býtisbil tilboð kr. 75.000. Kr. 86.000.



**NISSAN ALMERA 1.8 ELEGANCE**
Árg Juli. 02, Km 49.000. Aircondition, Fjarstýrt centrallás, Alarm, El-rútar, El-spegl, C.D.-Anlegg v.m. Kr. 138.000.



RL411
**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKTUR**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor, 4 WD v.Reduktiónsgear, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El-spegl, C.D.-Anlegg v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 108.000. Kr. 118.000.



UL405
**ROVER 45 1.8 CLUB**
Árg Mar-02, Km 54.800. Fjarstýrt centrallás, Alarm, El-rútar, El-spegl, Alufelgur, C.D.Anlegg v.m. Kr. 145.000.



**ROVER 25 CLUB**
Árg Sep-01, Km 38.400. Fjarstýrt centrallás, Alarm, El-rútar, El-spegl, Alufelgur, C.D.Anlegg v.m. Kr. 106.000.



**DAIHATSU SIRION**
Árg Juli.99, Km 53.800. Ein sera økonomiskur bilur, í góðum standi. Kr. 58.000.



**ROVER 620 TURBO INJECTION 200 HK**
Árg Jul-99, Km 94.000. Top modellið: 200 HK Turbo, Leðurinntrekk, Sóltak, Aircondition, Alufelgur, C.D.Anlegg v.m. Tilboð uttan býtisbil kr. 156.000. Kr. 168.000.



**DAIHATSU COURE 1.0 DE LUXE**
Árg Sept. 2000, Km 11.800. Sera vælhildin, De Luxe Model: Bert koyrt 11.800 km., Centrallás, El-rútar, El-spegl, Radio v.Bandsp. v.m. Eyka píkadekk v.felgum. Sertilboð kr. 60.000. Kr. 68.000.

P/f. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650

# Arctic Viking yvirhálast



*Arctic Viking liggur nú við kai á Vestaru Bryggju í Havn, meðan fólk frá skipasmiðjuni umvæla skipið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Týsmorgunin kom Arctic Viking á Havnina. Rækjutrolarin, sum framvegis er flaggaður út, fær eina yvirháling á Tórshavnar Skipasmiðju**

SKIPAFLOTIN
*Terji Nielsen*

Reiðarin á trolaranum úr Kollafirði, Johan Joensen, sigur, at talan er um vanligt viðlíkahald í sambandi við klassing.

### Strævið at fáa rakst-urin at hanga saman

Arbeiðið upp á Arctic Viking fer væntandi at taka umleið tvær vikur, greiðir Johan Joensen frá, og skipið fer beinan vegin til fiskiskaps aftur, tá ið umvælingararbeiði er liðugt, leggur hann afturat.

Arctic Viking hevur seinastu tíðina roynt á Flemish Cap, og skipið fer aftur á hesar leiðir, tá ið tað er liðugt umvælt.

Johan Joensen sigur, at tað fiskiskapurin hevur verið í lagi, men við vánaliga kiloprísinum á rækjum og høgu oljuprísunum, er tað strævið at fáa raksturin at bera seg.

Loyvið, ið Arctic Viking hevur at royna undir fremmandum flaggi, gongur út við árslok, og tá kemur skipið væntandi aftur undir føroyskt flagg.

# Forstjórin harmast missin

**Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, sær tað sum ein náttúrligan part av virksemi bankans, at Fiskavirking ikki longur er kundi hjá bankanum**

FÍGGJARHEIMURIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit um, at Føroya Banki hevði mist ein av sínum størstu kundum, nevnliga Føroya Fiskavirking. Nevndarformaðurin í Føroya Fiskavirking, Óli Hansen, vildi ikki gera nakrar stórvegis viðmerkingar til, hví fyritøkan nú hevur valt sær Kaupthing Bank sum høvuðsveitara av sínum peningatænasum og fíggjarvirksemi. Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, sigur tó, at eingin kuril er á tráðnum millum bankan og Fiskavirking.

### Soleiðis skal tað verða

Kappingin um kundarnar á fíggjarmarknaðinum er hørð, og hon harðnar støðugt. Í aktivari kapping koma og fara kundar, og soleiðis skal tað eisini verða, sigur Janus Petersen.

- Fiskavirking var ikki størsti kundin hjá okkum, men millum tíggju teir størstu hjá okkum, sigur Janus Petersen.

Forstjórin í Føroya Banka harmast sjálsvagt um missin av Fiskavirking, tí bankin hevur verið banki hjá felagnum, og var eisini ein aktivur partur í, at felagið varð sett á stovn í síni tíð. Janus Petersen leggur tó dent á, at talan ikki er um nakað brot við Fiskavirking, og at bankin framvegis hevur góð og vinarlig viðurskifti við felagið. Forstjórin dugir heldur ikki at ímynda sær, at nakað er í vegin fyri, at partarnir fara at samstarva meiri í framtíðini.

- Føroya Banki fer við góðum treysti inn í kappingina, og vit hava framvegis sum mál at økja um virksemi hjá okkum, og hetta kemur tað, at Fiskavirking hevur valt aðra fígging, ikki at broyta uppá, sigur Janus Petersen at enda.



*Forstjórin í Føroya Banka, Janus Petersen, harmast um missin av Fiskavirking, men heldur tað verða ein náttúrliga part av kappingini, sum er í føroyska fíggjarheiminum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*